## DAGSINS MEINING

# Strange Fruit

Sendingin í SVF týskvøldið var ein av teimum bestu. Átti at verið endursend. Til "skræk og advarsel". Hon bar heitið "Strange Fruit" - løgin frukt - um eina ta mest skammiligu og óhugnaligu tíðina í amerikanskari søgu – lynskingina av ósekum svørtum í suðurstatunum miðskeiðis í farnu øld. Sangurin um, hvussu hvítir amerikanarar uttan lóg og rætt hongdu ósek svørt í trøini, er nakað, sum vit øll eiga at geva gætur til áminning og ávaring.

Hóast farin tíð og nógv er broytt, síðani Ku Klux Klan og aðrir hvítir rasistar í Gods Own Country tóku lógina í egnar hendur og í hóphysterí myrdu svørt frá hond, so spøkir sama rasisman – um enn í øðrum búna - framvegis í USA og í øðrum framkomnum londum, har upplýsing, útbúgving og rættartrygd annars áttu at verið borganin fyri júst tí øvugta.Vit eru vitni til rasismu, sum kemur til sjóndar á so ymsan hátt. T.d. tá man vil nokta einum framtíðar demokratiskum Turkalandi atgongd til EU, um somu tíð sum hesi rættvísu og kristnu siga seg vilja byggja brýr millum lond, fólkasløg og heimspartar – vilja demokratisera umheimin – men samtíðis ikki vilja hava hesi við til borðs.

Sangurin "Strange Fruit", skrivaður av hvítum jøda í kjalarvørrinum á teimum ræðuligu lynskingunum, gevur okkum gásarhold og fær fram sterkar kenslur og tankar í okkum. Og tað eigur hann. Tí nútíðin eigur at læra av hesi fortíð. Á sama hátt sum tey littu í tátíðar USA royndu at forða fyri tí harðrendu og deyðsgevandi rasismuni, eiga vit í dag at forða teimum víðgongdu/ekstremu eitt nú ultrahøgravendu í USA einsvæl og fanatisku muslimunum í at brenna brýr millum menniskju, fólkasløg, religiónir, rasur og tjóðir.

Strange Fruit var protestsangur móti tátíðarinnar lynsjan. Orðini – myndamálið - og tónleikurin eru so kensluborin og rámandi, at tey áttu at verið borin fram aftur og aftur. Sama rasisma, tó í øðrum búna, livur framvegis í somu suðurstatum. Nú er myndin bara ein onnur. Kristna fundamentalistiska høgra, sum er so gróðurfest her,er rørslan, haðani Bush forseti fær sín stuðul. Her ræður eyga fyri eyga dømingin úr Gamla Testamenti. Eingin statur hevur tikið so mong av døgum sum føðistatur Bush. Eingin statur hevur so mong fongsul heldur. Her er tað in at døma út frá sokallaðum kristnum virðum. Tað er serstakliga umrødda rørsla, ið heldur lív í Bush og øllum hansara viðspælarum. Sum við lygnum megnaðu at sannføra sjálvt heiðurligar politikarar at fara í kríggj í Irak.

Deyðarevsingin er nútíðarinnar Strange Fruit. Rættartrygdin hjá fátækum og littum er lítil og eingin. Mong ósek enda í "stólinum". Ikki nóg mikið við tí. Nú royna somu kristnu fundamentalistar við Bush á odda at manna Hægstarætt - seinasta staðið, har fátøkk, litt og óvard, kunnu fáa sínar søkir lýstar - við sínum fólkum. Hesi, ið frammundan eru "lost" í amerikanska rættarsamfelagnum, skulu nú liva við óvissuni næstu 30 árini um, at Bush fólkini gjøgnum Hægstarætt koma at avgera rættindini hjá teirra børnum og abbabørnum. Hægstirættur, ið skal kunna verja ikki minst tey, sum í gerandisdegnum eru offur fyri rasismu og órættvísi, verður nú mannaður við fólki, ið høgravendi Bush persónliga hevur valt út. Strange Fruit eigur at minna okkum á, hvussu týðandi tað er at verja sanna demokratiið, har øll uttan mun til húðalit,trúgv, sosialt støði ella politiska áskoðan, hava somu rættindi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú vaska tey sínar hendur

**Frank Davidsen**



Meðan menn og kvinnur hava svøvnleysar nætur og stoltleiki sørvinga um nakrar dagar fer at sigla heim á sínum »síðsta« túri, vaska tey hendur.

Hesi fólk, sum siga seg hava sitið í nevnd felagsins í 20 ár, uttan at kunna havt nakra sum helst ávirkan á felagið, kunna hinvegin uppá nakrar dagar bjóða Kaupthing 60% av tí felagið, sum tey als onga ávirkan hava havt á í 20 ár.

Sjálvsagt eigur ein og hvør at hava loyvið til at selja síni partabrøv til hvønn hann vil, men bara at finna saman við eittans endamálið, at eingin bygdamaður skuldi fáa møguleikan tað er langt úti.

Hvat við teimum monnum sum hava mannað Vesturvón og minnilutan av partaeigarum. Eg ivist onga løtu í, at allir fíggingarstovnar høvu latið teimum monnum fígging, um tit bara høvdu selt tykkara partabrøv í bátinum, og so vóru vit ikki vitni til tann sorgarleik ið bygdin kemur at kenna sviðan av langt fram í tíðina.

Og so at siga, at ein av stovnarunum sum ikki er millum okkum longur, hevði tikið undir við at selja Vesturvón við kvotu inn á Skálafjørðin og til Ísland at fiska útfrá, tað sigur bara alt.

Sørvágs kommuna var við til at bjarga Vesturvón tá høvuðsmotorurin brotnaði í hálvfjersunum.

Við 27% nærum 1/3 av partapeninginum treytaði Sørvágs Kommuna sær við undirskirft av táverandi eigarum í gerðabók kommununar at Sørvágur heimstaður Vesturvóns ongantíð skuldi eiga minni enn 50% av partabrøvunum. Tíverri kom henda samtykt ongantíð í viðtøkur felagsins, helst av teirri orsøk, at eingin hevði fantasi at ímynda sær, at Vesturvón í óðum verki var seldur í tí dulda, og ikki í fríari sølu.

Alt týður uppá, at sjálvt um hesir partabrævaeigarar nú siga seg vera ónøgdir við tann mátan, reiðarin hevði rikið felagið, so høvdu teir ikki mansmót til at seta hann frá, tíansheldur teir høvdu so frægt av virðing fyri hinum partaeigarunum, at kalla til eykaaðalfund.

Orsøkin til, at eg loyvi mær at skriva hesa grein, er fyrst og fremst at mótmæla tí viðferð í nú fráfarandi reiðari fær frá teimum sum nú royna at vaska sínar hendur.

Hesin maður hevur seinastu 15-20 árini havt leiðsluna av eini fyritøku, sum hvat virðisøking viðvíkur er óhoyrt. Eitt partabræv uppá kr. 6.000,- gevur eigarunum 1.240.000,-.

Eg haldi hesin maður hevur annað uppiborið enn at vera brúktur sum alibi hjá tykkum, sum ikki bert vóru nøgd við virðisøkingina í partabrøvum tykkara, men eisini seldu til tað kvotu ið átti at vera heimahoyrandi í heimbygd tykkara.

Um bara tit høvdu átt eitt gram av medvitið og ábyrgdarkenslu fyri tykkara bygdafólki, hevði stoltleiki sørvinga Vesturvón ikki í dag siglt heim á sínum »síðsta« túri.

Eg meti meg eisini sum skattaborgara og sum partur av teimum 27% ið settar vóru í felagið, at hava rætt til at bera míni sjónarmið fram, sjónarmið sum flestu bygdafólk eisini taka udnir við.

# Yvirlýsing frá Miðflokkinum á Løgtingi

**– í sambandi við almenna orðaskiftið um rúsdrekkapolitikk**

**Jenis av Rana**
**Bill Justinussen**





Miðflokkurin fegnast um, at ljós verður varpað á trupulleikarnar, sum standast av ólógligari útskeinking av rúsdrekka. Hesin trupulleikin er afturvendandi, og hevur Miðflokkurin javnan reist málið á Løgtingi fyri politiskt at gera vart við støðuna. Tað er ein royndur lutur, at løgreglan hevur ein sera týdningarmiklan leiklut í rúsdrekkamálinum - bæði fyribyrgjandi og at tryggja lóg og landaskil, og tí eigur løgreglan at fáa neyðugar arbeiðsumstøðu fyri at kunna røkja sína uppgávu til fulnar.

Tó undrast undirritaðu tingmenn Miðfloksins á almennu útsøgnir fútans, har hann beinleiðis leggur seg út í politiska orðaskiftið. At fútin, sum umsitur útinnandi valdið, úttalar seg um, hvussu føroyskir politikkarar eiga at løggeva, tænir ikki hansara starvi og er við til at máa støðið undan politiska fyribyrgingararbeiðnum. Vónandi hevur fútin mistikið seg, tá hann alment hevur sagt sína politisku meining, og vónandi hevur hansara politiska uppfatan onga ávirkan á, hvussu hann røkir sítt starv sum ovasti leiðari løgreglunnar.

Miðflokkurin heitir á løgregluna um at geva fyribyrgjandi arbeiðnum millum føroyskan ungdóm hægstu raðfesting, so ungdómur okkara kann liva ungdómsárini uttan rúsfylt umhvørvi.

*Miðflokkurin*
*3. oktobur 2005*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.